## Stórt alment hall

Í Íslandi høvdu ríkið og kommunurnar 45 milliardir íslendskar krónur í halli í øðrum ársfjórðingi samanborið við 0,6 milliardir í halli í sama tíðarskeiði í 2008. Hagstovan í Reykjavík sigur, at ríkiskassin hevði 150 milliardir krónur í inntøku í øðrum ársfjórðingi samanborið við 163 milliardir somu mánaðir í fjør, tí minni kom inn í skatti og avgjøldum. Samstundis vuksu útreiðslurnar hjá tí almenna nógv, úr 163 milliardum í apríl ársfjórðingi í fjør upp í 195 milliardir somu mánaðir í ár.



## Meiri olja í Noregi

Norska oljufelagið StatoilHydro og tað svenska Lundin hava funnið tvær nýggjar olju- og gassleiðir í norskum sjóøki. Leiðin, sum StatoilHydro hevur funnið, er góðar fimm fjórðingar frá Aasgard-leiðini í Norskahavinum, og fyribilsmetingar siga, at millum 13 og 31 milliónir tunnur av olju og millum ein og tvær milliardir rúmmetrar av gassi eru í brunninum, sum StatoilHydro eigur 41 prosent av. Leiðin, sum Lundin hevur funnið, er suðuri í Norðsjónum, men enn hevur felagið ikki sagt nakað um, hvussu stór hon er. Lundin eigur 50 prosent av loyvinum.

# Lítið nýtt sjónvarp í vetrarskránni

**Tað verður ikki nógv føroyskt framleitt sjónvarp at síggja í vetrarskránni hjá Kringvarp Føroya. Peningurin strekkir ikki til, er grundgevingin**

KRINGVARP

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Seinasta hondin verður nú løgd á vetrarskránna hjá Kringvarp Føroya. Okkurt nýtt verður at síggja, umframt at okkurt gamalt eisini verður sent. Tó verður tað eftir øllum at døma ikki rúm til at framleiða nógv av nýggjum føroyskum tilfari.

Tað hevur ljóðað í seinastuni at Kringvarp Føroya verður noytt at spara gott og væl tvær milliónir krónur. Hetta avsannar Kringvarpsstjórin tó.

- Vit gera sum frægast fyri at halda okkum innanfyri fíggjarkarmarnar, er svarið, Annika Mittún Jacobsen, kringvarpsstjóri, gevur okkum, tá vit spyrja um møguligar sparingar eru á veg.

### Ikki rúm til framleiðslu

Nýggja vetrarskráin hjá Kringvarpinum er ikki fastløgd enn. Tað stendur tó greitt, at tað er ikki rúm fyri tí heilt stóru framleiðsluni av nýggjum sjónvarpssendingum.

- Kringvarpið hevur ikki fingið lønarkompenstatión síðan 2004, og síðani tá eru grundlønirnar hjá einum journalisti hækkaðar við 17 prosentum. Afturat tí koma so sjálvandi sáttmálabundnar yvirtíðir, vaktargjøld og umflokkingar. Tí eru vit nógv færri fólk nú, enn vit vóru í 2004, og tað eru heldur eingir freelance-arar eftir. Tá lønirnar, el, olja og aðrar rokningar eru goldnar, so er einki eftir. Men tað er jú eigarin – almennu Føroyar gjøgnum Mentamálaráðið - sum hevur valt, at tað skal verða soleiðis, greiðir Annika Mittún Jacobsen frá.

Millum tey tingini, sum verða í vetrarskránni, kunnu tó nevnast, at tað hvørja viku verður ein dokumentarsending, tann fyrsta við kringvarpsstjóranum sjálvari. Eisini verða barnasendingarnar hvørt fríggjakvøld, og har verður tað ein nýgjørd sending hvørja ferð.

Aðrar sendingar, so sum 3-2 og annað, verða sendar sum vanligt.



*Talan verður um eina skerda framleiðslu av føroyskum sjónvarpstilfari til vetrarskránna hjá Kringvarp Føroya (tilgjørd mynd)*

# Hjartadagur á Tvøroyri

**Hjartafelagið og Hjartabarnið hava leygardagin 19. september evnisdag á Seglhúsloftinum á Tvøroyri**

HEILSA

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Eitt serligt heilsuátak verður leygardagin 19. september á Seglhúsloftinum á Tvøroyri.

Tað eru Hjartafelagið og Hjartabarnið, sum skipa fyri evnisdag, ætlaðum lium við maka. Fólk, sum ikki eru limir, eru eisini vælkomin, og hugsað verður serliga um tey, sum eru hjartasjúk, hava pacemakara, hjartastartara og so foreldur og avvarðandi at hjartasjúkum børnum.

Dagurin byrjar klokkan 10 og endar klokkan 15.30, og skráin er løgd soleiðis, fyri at tey, sum ikki búgva í Suðuroynni, sleppa suður og norður aftur sama dag. Smyril fer úr Havn klokkan sjey um morgunin og av Drelnesi aftur klokkan 18.30.

### Nógv upplýsing

Læknarnir Heðin Thomsen og Hans Petur Nielsen fara at hava fyrilestrar.

Heðin Thomsen skal tosa um æðrakálking, blóðtøppar, pacemakarar og hjartastartarar. Hans Petur Nielsen fer at tosa um viðføddar hjartasjúkur hjá børnum.

Fysioterapeuturin Sára Danielsen fer at tosa um rørslu, kostráðgevin Beinta Leo um heilsugóðan mat, og sjúkrarøktarfrøðingarnir Amy Ljósheim og Marjun Thomsen fara at siga frá um hjartarehabilitering.

Haraftrat fer ein hjartasjúklingur at siga sína søgu um, hvussu tað var brádliga at gerast álvarsliga sjúkur, og foreldur at einum hjartasjúkum barni fara at greiða frá, hvussu tað var at fáa eitt hjartasjúkt barn.

Undirhald verður til børnini, meðan tey vaksnu lurta eftir fyrilestrunum.

Tiltakið er ókeypis, men neyðugt er kortini at tekna seg hjá Jensu Heinesen, tlf. 313422-213422, Sólvu Dam tlf. 311259-511259 ella hjá Beintu Ejdesgaard, tlf. 556467 í seinasta lagi týsdagin 15. september.